# Blómubindari til Fípuna í SMS

## Vit sóknast eftir einum røskum fólki at arbeiða 20-25 tímar um vikuna

Tú kemur at røkja nógvar ymiskar arbeiðsuppgávur í gerandisdegnum, og kemur at hava samband við nógv fólk. Tú kemur at loysa arbeiðsuppgávurnar í tøttum samstarvi við leigaran, og kemur at verða sett/ur gjølliga inn í arbeiðið í gerandisdegnum.

**Vit vænta av tær:**
- At tú kanska hevur royndir frá líknandi arbeiði og kennir til starvsgreinina
- At tú ert skilagóð/ur og megnar at hava nógvar bóltar í luftini í senn
- At tú ert nærløgd/lagdur, ert røkin og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- At tú ert ágrýtin og trívist við at hava nógv jørn í eldinum

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt avbjóðandi og fjøltáttað starv
- Eitt sjálvstøðugt arbeiði har tú fært møguleika at royna teg sjálva/n fult út
- Eitt arbeiðspláss har hýrurin er góður og áhugin fyri arbeiðinum stórur
- Møguleika fyri fakligari menning
- Løn sambært avtalu
- Byrja verður eftir avtalu

**Um hetta er nakað fyri teg, send so eina umsókn til:**
Carsten Rodenberg
crt@sms.fo

MIKLAGARÐUR

## Ferðavinnusamstarv millum Grønland, Ísland og Føroyar

Øll, ið hava áhuga fyri at fremja ferðavinnusamstarv londini millum, kunnu søkja um stuðul til verkætlanir, vørumenning, ferðir og tílíkt. Umsóknir skulu í minsta lagi fevna um samstarv millum tvey av hesum trimum londunum.

Stuðul verður í høvuðsheitum veittur til verkætlanir innan hesi øki:

**Menning av ‘kombinationsturisme’**
cruise, temaferðir, short break og tílíkt

**Útbúgving innan ferðavinnu**
uppihald til starvsvenjing, fakligar kanningarferðir, skúlaferðir, ferðavinnuútbúgvingar og tílíkt

**Marknaðarføring og greining av ferðavinnu**
víðkan av altjóða átøkum

Umsóknin skal skrivast á umsóknarblað, har møguliga nærri frágreiðing og fíggjarætlan kann leggjast við.

Umsóknarblað kann takast niður á www.mfa.fo ella www.northatlantic-islands.com
Umsóknin skal skrivast á donskum og sendast til:

**NATA**
**C/o Uttanríkisráðið**
Bryggjubakki 12
Postsmoga 118
FO-110 Tórshavn

Møguligir spurningar kunnu setast til:
Per Hansen á tel. 306133 ella teldupost: perh@mfa.fo

**Evstamark fyri at senda inn umsóknir er mánadagin 30. august 2010.**
Næsta freist at søkja er medio februar 2011

NATA er avtala millum ferðavinnuráðharrarnar í Íslandi, Grønlandi og Føroyum.
Endamálið við avtaluni er at menna samstarvið innan ferðavinnu í Útnorðri við at styrkja, samskipa og tryggja eitt framrættað samstarv innan tey øki, har felags ferðavinnu áhugamál eru.
Ein nevnd er sett at umsita NATA avtaluna og viðgerð umsóknir um stuðul til verkætlanir.

NATA
North Atlantic Tourism Association

# Starvsfólkaleiðari við hugsjónum

## Vit sóknast eftir nýggjum starvsfólkaleiðara



Eik

Í Eik leggja vit dent á ein virknan starvsfólkapolitikk, fyri at vit framhaldandi kunnu varðveita og draga dugnalig starvsfólk til Eik samtakið. Góður trivnaður, arbeiðsgleði og støðug starvsfólkamenning eru samstundis lyklaorð, tá tað snýr seg um at veita kundunum framúr fakliga og persónliga ráðgeving.

**Starvið**
Sum starvsfólkaleiðari vísir tú beinleiðis til stjórnina, og ert sparringspartnari hjá stjórnini, deildarleiðarum og starvsfólkum við fokus á loysnum. Tú hevur møguleika at orða og mynda framtíðar starvsfólkapolitikkin hjá Eik. Saman við leiðarunum hevur tú ábyrgd av at skapa rammur fyri víðari menning av hvørjum starvsfólki sær, og at standa fyri HR átøkum, sum stuðla undir tiltøk og verkætlanir, sum eru í gongd í samtakinum.

Starvsfólkadeildin er ein týðandi liður í miðvísa arbeiðnum at røkka teimum málum, sum samtakið setur sær.

Freistin at søkja er **24. august 2010.**

Í Eik samtakinum starvast á leið 400 fólk í Eik Banka í Føroyum, dótturfelagnum Inni P/F og í dótturfelagnum Eik Bank Danmark A/S. Á Starvsfólkadeildini Yviri við Strond í Havn starvast umframt leiðaran trý fólk.

**Umsóknin skal sendast til**
Eik Banki P/F
Bjarni Olsen, stjóri
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

Les meira um starvið á
www.eik.fo